## út at koyra

### Toyota motorar hei›ra›ir

Anna› ári› á ra› er »Hi-tech« hybridmotorurin hjá Toyota Prius og tann orkusparandi VVT-i motorurin hjá Toyota Yaris kosnir »Engine of the Year« av eini altjó›a dómsnevnd av útvaldum motorjournalistum.

***Kelda: Motor Magasinet***

### Donsku Mondeo politibilarnir

Eftir eina kanning av 123 Ford Mondeo politibilum, er Statens Bilinspektion komin til ta› úrslit, at trupulleikarnir vi› bremsunum á politibilunum koma av manglandi vi›líkahaldi, og skeivari eftirmontering av útger›.

***Kelda: Ford Motor Company A/S***

### Volvo til Belgia

Volvo lei›slan hevur gjørt av, at tá verandi avtalan vi› Mitsubishi, um framlei›sluna av S og V40 modellunum á NedCar verksmi›juni í Hollandi gongur út, ver›ur framlei›slan flutt til Gent í Belgia.

***Kelda: Volvo Personvogne Danmark A/S***

# Chrysler PT Cruiser og Panel Cruiser

Magnus Gunnarsson

Hóast Chrysler í fleiri ár hevur havt sermerktar konseptbilar á bilaframs‡ningum, fyri at vita hvussu fólk taka ímóti teimum, ver›a ikki allir settir í framlei›slu.

PT Cruiser var eisini á fleiri frams‡ningum, har áhugin var so stórur, at avger› var› tikin um at hann skuldi framlei›ast.

*Sum fyrr í tí›ini, bilførarin hevur úts‡ni frameftir yvir motorhjálmin, me›an forskermarnar ikki síggjast*

### Íblástur frá Ford 1939

Hetta má metast sum ein stór avger› hjá DaimlerChrysler, sum tann fyrsti, i› tordi at seta ein n‡ggjan gamaldags bil í framlei›slu. VW kom vi› Beetle, i› hevur gomlu bobluna sum fyrimynd, me›an PT Cruiser ikki hevur nakran ávísan bil sum fyrimynd, men hann hevur fingi› íblástur frá einum Ford frá 1939. Ein kanning vísir, at tey ungu halda at stílurin á bilinum er frá 70-árunum, tey um mi›alaldur halda hann líkjast bilum frá 50-árunum, me›an fleiri halda hann minna um bilar frá 40-árunum. PT Cruiser er væl dámdur av teimum ungu, tí hann er líka so annarlei›is og charmerandi í veruleikanum sum hann sær út á myndunum, innan er hann tó sum ein nútímans bilur. PT Cruiser og VW Beetle hava tó ta› til felags, at bá›ir ver›a gjørdir í Mexico.

*Panel Cruiser minnir um ein gamlan vørubil frá 50-árunum*

### Panel Cruiser

Me›an PT Cruiser stendur fyri People Transport Cruiser, er ein Panel Cruiser, sum er ein vøruvognsútgáva av PT Cruiser á veg, hann minnir um ein gamlan vørubil frá 50-árunum.

***Kelda:Bilen Motor & Sport***

**Chrysler PT Cruiser**

| | |
|---|---|
| *Motorurin:* | *2,4 litur V6 24 ventilar* |
| *Effekt:* | *220 hk.* |
| *0-100 km/t:* | *8.0 sek.* |
| *Toppfer›:* | *210 km/t* |

# VW Polo Roadster

Magnus Gunnarsson

Volkswagen stjórin, Ferdinand Piëch, hevur ætlanir um ein lítlan roadster, bygdan yvir ein VW Polo plattform, i› er tann sami sum Skoda Fabia brúkar. Hóast Polo Roadster ver›ur forhjólstrektur, er ætlanin at hann skal kappast vi› Mazda MX-5, i› hevur bakhjólstrekk. Teir ver›a tó kappingarførir í stødd og prísi. Á hesi myndini hjá teknaranum DeLusi, sæst at talan ver›ur um ein sera elegantan bil, sum møguliga eisini kemur í eini Seat útgávu.

***Kelda: FDM / Motor***



## út at koyra

# Suzuki Wagon R+ – ein sló›brótari í n‡ggjari útgávu

Magnus Gunnarsson

Japanska Suzuki fyritøkan var› stovna› í 1909 sum ein verksmi›ja, i› framleiddi maskinur til klædnaídna›in, so sum seymimaskinur o.a. Fyrstu motorsúkklurnar komu í 1952, og í 1955 framleiddu teir fyrsta bilin. Suzuki eru kendir fyri sínar framkomnu motorsúkklur, og smáu persónbilar og jeepar.

### Longdur 10 cm

Hesin n‡ggi Suzuki Wagon R er framleiddur í Ungarn. GM-Opel eiga nú 15 prosent av Suzuki. Fyritøkurnar hava í nøkur ár samstarva› um ymisk bilmodell í USA, men hetta er teirra fyrsta verkætlan í Europa, har teir arbei›a saman um Wagon R og Opel Agila. N‡ggja útgávan av Wagon R líkist forgangaranum. Tó virkar hesin heilt annarlei›is at síggja til og at koyra, eins og hann sær størri út, nú hann er longdur vi› 10 cm.

### Krevur líti› pláss

Man situr høgt í Wagon R, og bilurin er lættur at yvirsko›a, hann krevur líti› pláss, tí er ikki trupult at finna honum eitt parkeringspláss. Ta›, at man situr høgt í bilinum, sparir pláss í kabinuni, vi› ta› at ikki er ney›ugt at strekkja beinini langt frameftir. Forsetrini kunnu koyrast langt aftur, og stórir persónar sita væl vi› rætti›. Innan merkist samarbei›i› vi› Opel t‡›uliga. Instrumentpaneli›, rætti› og kontaktir líkjast nógv tí á Opel Astra. Baklúkan er stór og lessihæddin lág, so ta› er lætt at fáa stór ting inn í bilin. Vi› at leggja baksetrini ni›ur, ver›a 1250 litrar at rá›a yvir, og vit hava ein vøruvogn.

### 1,3 motor og 76 hk

Koyrieginleikarnir eru betra›ir, og fja›raskipanin ger bilin so gó›an at koyra, at man heldur seg koyra í einum nógv størri bili. Eisini ta› hann hevur fingi› 14” hjól ísta›in fyri 13” ger heilt gó›an mun. Wagon R fæst einans vi› einari motorstødd, ta› er ein n‡ggjur 4 syl. 1.3 litur 16V motorur vi› 76 hk. Fyri at lætta um vektina er motorblokkurin og toppstykki› úr aluminium.

Listin yvir standard útger› er langur, sum t.d. ABS bremsur, dupultan airbag, elektriska servost‡ring, trygdarbjálkar í hur›unum, pedal-trygdarskipan, nakkapútur at stilla aftan og framman, startsperru, stereo radio, el-sí›urútar framman, el sí›uspegl og sentrallás. Hóast Wagon R er ein lítil bilur, er hann tryggur at koyra í, eins og hann hevur 3 ára mekaniskt garanti og 12 ára garanti móti gjøgnumtering.

*N‡ggja útgávan av Wagon R líkist forgangaranum, tó virkar hesin heilt annarlei›is at síggja til og at koyra*

*Baklúkan er stór og lessihæddin lág, so ta› er lætt at fáa stór ting inn í bilin*

**Suzuki Wagon R+**

| | |
|---|---|
| *Motorurin:* | 4 syl. 1,3 litur 16V 76 hk. |
| *0-100 km/t:* | 12.8 sek. |
| *Bensinn‡tsla:* | 16,4 km/l |
| *Dekkstødd:* | 165/60-14 |
| **Stødd og vekt** | |
| *Longd:* | 3,50 m |
| *Breidd:* | 1,62 m |
| *Hædd:* | 1,70 m |
| *Eginvekt:* | 900 kg |
| *Totalvekt:* | 1350 kg |
| *Vi›førisrúm:* | 300 litrar (v/ baksetrinum ni›ri 1250 litrar) |
| *Prísur:* | kr. 129.900,- |
| *Søluumbo›:* | Ey›bjørn Hansen<br>Var›agøta 75<br>FO-100 Tórshavn<br>Tel. 313375 |